# FS Vágar 2004 kom víðari



**Fyrsti dysturin í fótbóltskappingarárinu m var leiktur í Hvalba leygardagin, tá ið Royn og FS Vágar 2004 spældu innleiðandi dyst í kappingini um Løgmanssteypið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fótbóltskappingarárið 2005 er farið av bakkastokki. Fyrsti veruligi dysturin á árinum var leiktur í Hvalba leygardagin, har Royn og FS Vágar 2004, sum vágamenn nú rópa liðið hjá sær, brustu saman.

Talan gjørdist um ein rættuliga javnan dyst, og avgerðin fall ikki, fyrr enn okkurt um tíggju minuttir vóru eftir av dystinum. Tà fingu vágamenn brotsspark, og tað setti Birgir Joensen í netið til 1-0, sum eisini gjørdist úrslitið av dystinum.

Við sigrinum hevur FS Vágar spælt seg víðari í kappingini, og nú fáa teir høvi til at royna seg í eini rættuligari lokaluppgerð, tí mótstøðuliðið í næsta umfari verður eingin annar enn SÍ úr Sørvági. FS Vágar má tó metast sum stórfavorittar til tann dystin, tí liðið spælir á hægri støði enn sørvingar, og harumframt hava teir eisini nógvar spælarar, ið hava royndir úr fremstu deildini í Føroyum.

# Heimaliðið vann Klaksvíkskappingina

**Tað var heimaliðið KÍ, sum um vikuskiftið vann árligu Klaksvíkskappingina**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Afturvendandi Klaksvíkskappingin, sum á hvørjum ári verður leikt stutt undan, at fótbóltskappingarárið fer á rull, var á skránni um vikuskiftið. Sum siður er luttóku trý tey fremstu liðini frá undanfarna ári umframt KÍ.



## Smurdu javnaldrarnar av

Leygardagin vóru hálvfinalurnar leiktar. Lutakastið vildi tað so, at tað vóru B36 og Skála, sum hittust í aðrari, meðan javnaldrarnir KÍ og HB hittust í hinari.

Dysturin millum Skála og B36 gjørdist rættuliga javnur, men tað var havnarfelagið, ið dróg longra stráið og vann dystin 1-0. Málið skeyt annar av klaksvíkingunum hjá B36, Allan Mørkøre, sum leygardagin slappi at royna seg í álopinum hjá árstalsfelagnum.

Hin hálvfinalan stóð sum áðurnevnt millum heimaliðið KÍ og greipuvinnararnar úr HB. Hendan dystin vunnu klaksvíkingar greitt 4-1, og talan var veruliga um klassamun, frætta vit úr Klaksvík.

Málskjúttar hjá KÍ hendan dagin vóru Ove Nysted, Arnhold Joensen og Heðin á Lakjuni, umframt at HB gjørdi eitt sjálvmál. Málið hjá HB skeyt Jákup á Borg.

## Jøvn finala

Sunnudagin var tí fyrst leikt um 3. og 4. plássið, og hesin dystur stóð sjálvsagt millum Skála og HB. Her var HB greitt tað betra liðið, og teir vunnu eisini dystin fult uppiborið 4-1. Hvørki HB ella Skála vóru fullmannaði til dystin.

Eftir at tað var greitt, hvør gjørdist nummar trý og nummar fýra, var so finalan millum KÍ og B36 á skránni.

Finalan var rættuliga jøvn og spennandi, og til tíðir var hon eisini rættuliga vælspæld. Tað var tó heimaliðið KÍ, sum gjørdist vinnari av kappingini, tí teir vunnu finaluna 1-0. Málið skeyt sterki verjuleikarin Ove Nysted í seinna hálvleiki.

Tað er kanska eitt sindur tíðliga at gera sær nakrar niðurstøður út frá eini slíkari kapping, men tað skerst ikki burtur, at serliga KÍ tykist verða rættuliga væl fyri í ár. Liðið hevur fingið styrk frammalaga á vøllinum, og tað hevur munað væl.

Hjá HB kann tað eisini vísa seg, at luttøkan í kappingini gjørdist kostnaðarmikil, tí leikandi venjarin, Heine Fernandez, noyddist leygardagin í dystinum móti KÍ av vølli við skaða í knænum, og tað tóktist verða talan um ein heldur álvarsligan skaða.

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 527 | 465 | 62 | 22 |
| 2 Kyndil | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 534 | 446 | 88 | 16 |
| 3 StÍF | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 483 | 506 | -23 | 15 |
| 4 KÍF | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 448 | 489 | -41 | 11 |
| 5 H71 | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 515 | 535 | -20 | 9 |
| 6 Neistin | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 489 | 555 | -66 | 6 |

SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 512 | 364 | 148 | 23 |
| 2 VB | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 584 | 350 | 234 | 21 |
| 3 Neistin | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 537 | 404 | 133 | 14 |
| 4 Søljan | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 479 | 417 | 62 | 14 |
| 5 VÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 436 | 447 | -11 | 7 |
| 6 StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 424 | 490 | -66 | 7 |
| 7 Kyndil | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 382 | 503 | -121 | 7 |
| 8 Tjaldur | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 282 | 661 | -379 | 0 |

# FM finala fyri pør í bridge

Leygardagin 12. mars 2005, verður árliga finalan, har føroyameistaranir fyri pør skulu finnast. Kappingin er altíð ein av teimum best umtóktu kappingunum, ið FBS skipar. Finalan byrjar kl. 10:00 og verður hon leikt í Bridgehúsinum í Havn. Spæld verða 76 spøl. Fyri at koma í finaluna, hava øll tey 20 pørini, ið eru komin í finaluna, kappast í einari hálvfinalu, sum varð leikt síðst í februar. Í hálvfinaluni varð skipað í tveimum røðum.

**Vinnarinir av tí gula raðinum gjørdist:**
Høgni Jacobsen - Finn Ougaard

**Vinnarinir av tí grøna raðinum gjørdist:**
Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen

**Tey 20 pørini, ið luttaka í finaluni:**
Heðin Jacobsen - Finn Ougaard
Eilif Petersen - Petur A. Johannesen
Salomon Johansen - Zakaris Joensen
Eyðun Jensen - Georg Egholm
Kaj Alstrup - Høgni Hansen
Ásla Weihe - Hallgerð Hansen
Dia Jacobsen - Jógvan Ranghamar
Jón Andreasen - Danny Danielsen
Allan Dal-Christiansen - Magni Jøkladal
Heðin Mouritsen - Jóannes Mouritsen
Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen
Bogi Simonsen - Símin Lassaberg
Helgi Joensen - Niels Nielsen
Eyðun S. Olsen - Dikta Ellingsgaard
Marner Joensen - Árni Dam
Oddmar Danielsen - Einar Ellingsgaard
Rói Á Rógvu Joensen - Jákup Hjaltalin
Carl Mikkelsen - Egil Helmsdal
Eyðun Jakobsen - Pól Joensen
Eyðun Anthoniussen - Robert Langaard

## Spæl

Spælið er frá hálvfinaluni fyri pør í bridge. Tað vóru nøkur heilt fáa pør, ið meldaðu hendan stóraslemmin. Her síggja vit hvussu lætt tað var hjá Símin Lassaberg og Boga Simonsen.

Sp D43 EK8752
Hj EKDBT8 _ 9
Rú ED85
BT7
Kl - K85

| | |
|---|---|
| | 2sp 1) |
| 2nt 2) | 3rú 3) |
| 4kl 4) | 4sp 5) |
| 5kl 6) | 5hj 6) |
| 7sp. | |

1) 6 lit í spar og 10 - 14 hp.
2) Spyr um hondina.
3) Min. við einari skeivari hond.
4) Spyr um kontrol í kleyv.
5) Havi kontrol í kleyv og tvey ess.
6) Spyr um tað er kleyvar ess, ið kontrollurin.
7) Havi ikki kleyvar ess og ikki trumf damu.

Lætt og elegant, men tá ið trumfurin sat 4 - 0 (10%) mátti slemmurin niður.